Bárður er við men sum áskoðari

Bárður B. Mikkelsen hevur staðið seg væl í danska felagnum Holte - men bara í landskappingini. Hann hevur ikki loyvi til at spæla í steypakappingini, og nú Holte eisini skal í Europa Cup, verður Bárður ikki við á vøllinum. Orsøkin til tað er stutt sagt tann, at hann er føroyingur

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Tað hevur gingið væl hjá føroyska landsliðsleikarannum Bárður B. Mikkelsen, sum spælir hevari hjá Holte IF í bestu dansku deildini. Og tað gongur eisini væl hjá sjálvum liðnum, sum um vikuskiftið spældi hálvfinalu í dansku steypakappingini móti Middelfart VK. Holte, sum hevði heimavøll, vann trygt 3-0 (25-16, 25-14, 25-19).

Bárður var ikki við, tí hann hevur eisini spælt í steypakappingini við gamla felagnum hjá sær, Marienlyst Volley. Reglurnar siga, at ein leikari ikki kann spæla við tveimum ymiskum liðum í somu steypakapping. Danska steypafinalan millum Holte og HIK Aalborg (vunnu 3-0 móti DHG Odense) verður leikt 18. desember í Århus, men tá kann Bárður sum vera man heldur ikki vera við sum annað enn áskoðari.

Finalan verður annars millum tey bæði liðini, sum í løtuni eru fremst í Danmark. HIK Aalborg er nummar eitt, og Holte er nummar tvey.

Spæliloyvi fyri 12.000 krónur

Holte er eisini við í Europa Cup kappingini CEV Cup, men heldur ikki her sleppur Bárður upp í part. Tað er nevniliga soleiðis, at hann sum føroyingur ikki hevur spæliloyvi at leika fyri eitt danskt felag í Europa Cup samanhangi. Bárður hevur spælt landsdystir fyri Føroyar og er tí í flogbóltshøpi at rokna sum føroyingur.

Um Holte skal hava hann við, noyðist felagið at rinda 12.000 krónur um árið fyri eitt spæliloyvi. Ein órímiliga stór upphædd, og rættliga óheppið hjá Bárði og Holte. Sum eitt plástur á sárið bjóðar Holte ivaleyst Bárði við sum áskoðari til kappingina, sum er í bosniska høvuðsstaðnum Sarajevo.

Tað verður vikuskiftið 7.-9. desember, og talan er um 2. umfar í kappingini.

Í fyrsta umfari vann Holte lættliga báðar dystirnar móti Azerroil Baku úr Aserbadjan 3-0. Hetta næsta umfarið er skipað sum eitt ólkaumfar við fýra liðum, sum øll spæla ímóti øllum. Umframt Holte eru liðini Sarajevo úr Bosnia, Eregli úr Turkalandi og CSKA Sofia úr Bulgaria.

Næsti dysturin hjá Holte verður annars nú sunnudagin í dansku landskappingini móti DHG Odense, og tá sleppur Bárður so at vera við. Holte hevur longu tryggjað sær pláss í endaspælinum, sjálvt um tveir dystir eru eftir at spæla áðrenn jól.

Óvæntaður javnleikur

Súni Olsen og FC Zwolle máttu óvæntað taka til takkar við javnleiki móti botnliði

HOLLAND
Jákup Mørk

Súni Olsen kom á vøllin seinastu 25, tá FC Zwolle minuttirnar leikti javnleik, 2-2, ímóti Helmond Sport.

Úrslitið var heldur óvæntað, tí á stigatalvuni er stórur munur millum tey bæði liðini, og í Zwolle verður heldur ikki dult fyri, at úrslitið var eitt vónbrot,

Á heimasíðu felagsins verður enntá tikið til, at nú kann Zwolle gloyma alt um ein oddasess, men so svart er tað ikki enn í øllum førum.

Munurin upp til Excelsoir er í løtuni seks stig, men enn eru 19 dystir eftir at spæla, so Súni og teir hava framvegis møguleikan.

Tveir javnleikir

Føroysku liðini í Danmark spældu hvør sín javnleik sunnudagin

SUPERLIGA
Jákup Mørk

Eingin føroyingur var á vøllinum, tá 17. umfar í dansku superliguni varð avgreitt sunnudagin.

OB var á vitjan í Viborg, og uttan Johan Byrial Hansen eydnaðist tað teimum av Fjóni at fáa eitt stig við sær heimaftur. OB var annars á odda í dystinum, sum endaði 1-1.

FCK skuldi somuleiðis á útivølli royna seg móti AB, og tað var um reppið, at FCK vann móti liðnum, sum í løtuni er á øðrum plássið. Tá klokkan var farin um teir 90 minuttirnar var FCK framvegis á odda, men í yvirtíðini endaði ein bóltur í málinum eftir trunkaspæl. FCK-leikararnir vildu vera við, at bólturin ongan tíð hevði verið innan fyri strikuna, men dómarin lat ikki við seg koma.

Iðranin um stigamissin gjørdist ikki minni í FCK, tá tað seinni frættist, at Brøndby púra óvæntað hevði tapt 1-0 fyri botnproppinum úr Silkeborg. Við fyrrverandi leikaranum, Morten Bruun, venjarasessinum hevur Silkeborg nú vunnið tveir dystir á rað, og útisigurin móti Brøndby gevur helst góðar vónir fyri framtíðina.

Mánakvøldið eftir evstamark okkara skuldi Esbjerg spæla útidyst móti FCK, so kanska kemur ein føroyingur kortini á vøllin hetta umfarið.

Mistu á heimavølli

Hull fekk bert málleysan javnleik burtur úr dystinum móti Bristol Rovers, og hetta var minni enn ætlað

ONGLAND
Jákup Mørk

Hull City mistu leygardagin tvey týdningarmikil stig, tá tað ikki eydnaðist teimum at vinna á Bristol Rovers í ensku triðju deildini.

Bristol hevði undan hesum dystinum ikki skotið mál í fimm dystir á rað, og hetta eydnaðist teimum heldur ikki hesa ferð. Í ensku miðlunum verður sagt, at tað var rár hending, at Bristol hótti málið hjá Hull, men hóast Julian og teir so ruddiliga vóru við yvirlutan, so eydnaðist teimum ikki at seta avgerandi bóltin í kassan.

Tí er einki at siga til, at stóra hetjan eftir dystin var málverjin hjá Bristol Rovers, Scott Howie. Fleiri ferðir hevði hann framúrskarandi bjargingar, sum onkursvegna noyddi Hull at fara málleysar av vøllinum. Julian Johnsson spældi allar 90 minuttirnar hjá Hull.

Javnleikurin merkir, at Hull nú er á fýrða plássinum í fjórðbestu ensku deildini, men bert eitt stig er upp til annað plássið, sum hevur beinleiðis upplytan til aðru deild.

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Brøndby	17	12	-	3	-	2	42	9	33	39
2	AB	17	8	-	7	-	2	28	16	12	31
3	FCK	17	8	-	6	-	3	26	16	10	30
4	AaB	17	9	-	3	-	5	28	24	4	30
5	Esbjerg	16	8	-	2	-	6	22	23	-1	26
6	FCM	17	6	-	7	-	4	24	15	9	25
7	OB	17	6	-	6	-	5	25	25	0	24
8	Viborg	17	3	-	8	-	6	19	22	-3	17
9	AGF	16	3	-	5	-	8	17	26	-9	14
10	Lyngby	17	2	-	7	-	8	16	30	-14	13
11	Vejle	17	3	-	4	-	10	20	45	-25	13
12	Silkeborg	17	2	-	4	-	11	13	29	-16	10

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Johan Byrial Hansen (OB), Christian Høgni Jacobsen (Esbjerg)

Støðan, hollendska toto-deildin

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Excelsoir +	15	11	-	2	-	2	33	11	22	35
2	Emmen	15	9	-	4	-	2	28	17	11	31
3	RBC Roo'daal	15	8	-	5	-	2	34	18	16	29
4	FC Zwolle	15	8	-	5	-	2	28	17	11	29
5	ADO Den Haag	15	8	-	4	-	3	22	12	10	28
6	BV Veendam	15	8	-	4	-	3	31	22	9	28
7	Cambuur/L.	15	8	-	3	-	4	25	14	11	27
8	Haarlem	15	6	-	4	-	5	19	19	0	22
9	Dordrecht '90	15	6	-	3	-	6	30	23	7	21
10	FC Volendam	15	6	-	2	-	7	27	22	5	20
11	G.A. Eagles	15	4	-	5	-	6	26	35	-9	17
12	Storm/Telstar	15	4	-	4	-	7	21	20	1	16
13	MVV	15	4	-	4	-	7	20	26	-6	16
14	VVV	15	5	-	0	-	10	26	32	-6	15
15	Heracles A.	15	4	-	2	-	9	20	23	-3	14
16	Helmond Sp.	15	3	-	5	-	7	11	24	-13	14
17	Top/Oss	15	2	-	1	-	12	10	48	-38	7
18	Eindhoven	15	1	-	3	-	11	16	44	-28	6

Perioduvinnarnari eru merktir »+«
Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

Støðan, enska 3. deild

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Plymouth	20	13	-	5	-	2	31	11	20	44
2	Rochdale	20	11	-	5	-	4	31	20	11	38
3	Mansfield	20	11	-	5	-	4	32	22	10	38
4	Hull	20	10	-	7	-	3	33	20	13	37
5	Luton	20	11	-	3	-	6	40	27	13	36
6	Shrewsbury	20	10	-	4	-	6	31	23	8	34
7	Scunthorpe	20	8	-	8	-	4	36	20	16	32
8	Kidderm.	20	8	-	5	-	7	19	18	1	29
9	Hartlepool	20	8	-	3	-	9	24	17	7	27
10	R&D	20	6	-	9	-	5	20	19	1	27
11	Cheltenham	20	6	-	8	-	6	28	29	-1	26
12	Leyton O.	20	7	-	5	-	8	28	31	-3	26
13	Darlington	20	7	-	5	-	8	24	29	-5	26
14	Exeter	20	6	-	6	-	8	22	34	-12	24
15	Lincoln C.	20	5	-	8	-	7	21	22	-1	23
16	Southend	20	7	-	2	-	11	22	25	-3	23
17	Swansea	20	6	-	5	-	9	26	31	-5	23
18	Oxford Utd.	20	5	-	7	-	8	20	22	-2	22
19	York	20	6	-	4	-	10	24	34	-10	22
20	Bristol R.	20	5	-	6	-	9	14	22	-8	21
21	Torquay	20	6	-	3	-	11	15	29	-14	21
22	Macclesfield	20	4	-	7	-	9	17	27	-10	19
23	Halifax	20	4	-	7	-	9	14	28	-14	19
24	Carlisle	20	3	-	7	-	10	15	27	-12	16

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull City)

Støðan, meistaradeild kvinnur

Støðan Lið	Dystir leiktir	Sett vunnir	* taptir	vunnin	tapt	munur	Stig
TB	6	4	1	16	5	11	10
ÍF 5	3	2	11	7	4	6	
Dráttur	5	2	3	9	11	-2	4
Mjølnir	5	2	3	7	11	-4	4
Fleyr	5	1	4	5	14	-9	2

Støðan, meistaradeild menn

Støðan Lið	Dystir leiktir	Sett vunnir	* taptir	vunnin	tapt	munur	Stig
Fram	6	5	1	16	10	6	10
Sí 6	5	1	16	6	10	10	
Mjølnir	5	2	3	9	11	-2	4
Fleyr	5	2	3	9	11	-2	4
ÍF 6	0	6	5	18	-13	0	

Olaf og Ólavur vunnu

Spenningurin var stórur, nú níggjunda umfarið í HT-Open varð leikt

Stríðið um fyrsta pláss í HT-Open varð sera spennandi, har favoritturin, Ólavur Simonsen, í tøkum tíma fekk hálað seg inn á oddafiskin

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Undan næstseinasta umfarinum lógu Martin Poulsen og Olaf Berg javnir í toppinum við seks stigum av sjey møguligum. Eitt stig aftari vóru Ólavur Simonsen og Hans Kristian Simonsen. Eisini kundi Herluf Hansen á fimta plássi blanda seg í toppin.

Eftir áttanda umfar broyttist støðan í toppinum, eftir at Olaf og Martin heldur óvæntað taptu ímóti ávíkavist Johan E. Hansen og Herluf Hansen, meðan Ólavur Simonsen vann sítt avgerandi talv á Hans Kristiani. Tískil lógu tríggir javnir á odda undan seinasta umfarinum, sum bleiv leikt fríggjakvøldið.

Olaf og Ólavur vunnu sum væntað síni talv ímóti ávíkavist Eyðálvi Johannesen og Johan E. Hansen. Fyrrverandi føroyameistarin Súni Ziska megnaði at fáa javnleik ímóti Martini, sum viðførdi at Martin mátti taka til takkar við deildum triðja plássi saman við Herlufi, sum vann á Andrias Ziska.

Olaf og Ólavur vunnu tískil HT-Open 2001 við sjey stigum og eisini góðar virðislønir ognaðu teir sær. Umframt fyrstu virðisløn, vann Olaf eisini virðislønina sum besti unglingur í kappingini. Føroya Banki gav hesa virðisløn.

Feðgar á ferð

Verdir at nevna eru teir mongu lovandi unglingarnir sum luttóku við góðum úrslitum. Eitt nú Fríbjartur D. Olsen við fimm stigum og Helgi Ziska - sonur Andrias Ziska - høvdu eina framúr góða kapping. Feðgarnir Andrias og Helgi fingu báðir hálvtfimta stig.

Toppurin

Olaf Berg	7,0/9
Ólavur Simonsen	7,0
Martin Poulsen	6,5
Herluf Hansen	6,5
Hans K. Simonsen	6,0
Johan E. Hansen	5,5

FM í útisetu

Eitt umfar restar í kappingini um at finna útisetaføroyameistaran í Keypmannahavn. Eftir at tann vælleikandi klaksvíkingurin Terji Petersen óvæntað vann á Heina Olsen í sætta og næstseinasta umfarinum, og Carl Eli N. Samuelsen vann á Finnbjørn Vang, er líkt til at Terji vinnur kappingina. Terji hevur fimm stig, meðan Finnbjørn og Heini hava hálvtfimta stig. Carl Eli kann ikki vinna við sínum hálvumfjórða stigi.

Terji hittur Dannie Nielsen, sum liggur aftastur, í síðsta talvinum, meðan Finnbjørn og Heini telva ímóti ávíkavist Regin Reinert og Ian Leyni, sum báðir liggja í tunga endanum.

Kasparov og Kramnik

Leygardagin 1. desember fara Garry Kasparov og Vladimir Kramnik undir lítlan talvdyst, nevnd Botvinnik Memorial. Fyrrverandi heimsmeistarin og russin Mikhail Botvinnik hevði verði 90 ár í ár.

Ætlanin varð at eisini Anatoly Karpov skuldi luttaka, men hann valdi brádliga at bróta sáttmálan og fer ístaðin at telva í FIDE HM, sum byrjar í dag, týsdagin 27. november. Kasparov og Kramnik avgjørdu síðani at telva sínamillum, og skráin er hendan: Fýra vanlig langtalv, síðani seks kviktalv (25 min hvør) og eftir hendan dyst fara kjempurnar at telva ein snardyst við tíggju talvum.

Ein øgilig avbjóðing til báðar partar, kanska serliga gleðist Kasparov til dystin eftirsum hann fyri sløkum árum síðani tapti HM dystin ímóti júst Kramnik. Fylgið við á www.kasparovchess.com.

Talvið hesa vikuna

Martin Poulsen (2085) — Hans K. Simonsen (1965)
HT-Open (6. umfar)

Fronsk byrjan
1.e4 e6 2.Rif3 d5 3.Ric3 Rif6 4.e5 Rifd7 5.d4 c5 6.Be3 Ric6 7.Bb5 cxd4 8.Bxd4 a6 9.Ba4 b5 10.Bb3 Be7 (Rímiliga javnt eftir byrjanarspælið, men hvítur hevur nógv størri rásarúm) 11.0-0 Bb7 12.Re1 Rixd4 13.Fxd4 0-0 14.Rad1 (Rókarnir báðir eru nú við í talvinum, og væl standa teir) 14...Rc8 15.Fg4 Ric5 16.Rid4 Fb6? (Neyðugt var helst: 16...Rixb3) 17.Bxd5!! (Vinnandi leikur) Bxd5 18.Rixd5 exd5?

(Svartur hevði seinasta møguleikan við Fb7, men hvítur fær tó kortini avgerandi fyrimun) Nú slóg Martin til og leikti: 19.Rif5 (Nú vinnur hvítur uttan trupulleika 19...Bf6 20.exf6 Fxf6 21.Rie7+ Kh8 22.Rixc8 Rie4 23.f3 (Og Hans Kristian gavst sjálvandi við róki minni) 1-0

Fremstu telvararnir í kappingini vóru teir báðir, Olaf Berg og Ólavur Simonsen, sum her standa ytst í borðunum. Teir báðir í miðjuni eru Herluf Hansen og Martin Poulsen

Umframt fremsta plássið í kappingini, fekk Olaf Berg eisini heiðursløn sum besti unglingin